Grias Ellingsgaard
til minnis

Hann doyði hósdagin 5. juni, og fór til gravar sunnudagin 8. juni

Sólsærsama løta
av summarlondum
fevnir um kistu og fólk
á gravarrondum.
Mortítlingaljóð í sálmaløgum
fylgja kistu at hvíldarstøðum.
Sunnudagsfriður liggur um hól og lá
nú sálin er sæl
henda halga dag.

Tú summarljósa halga ond
kyss hansar' blikaðu hond
víð tíni megi
og leið hann til lívsins lond
á evsta degi.

Her á kirkjugarði
er reitt tær eitt bó!
á eingjarstaði.

Ljósdrivnar kærleiksløtur
vakna við Harrans føtur.

Lívssælur liggur tú
og droymir um Fuglafjørð
um æviga sólarglæmu,
ið fer um bláan fjørð.-
Tú vart so góður fótbóltsmaður
tú ert sælur -
ja, æviga glaður.

Takk fyri tíð
á hesi jørð
fyri mong góð heimsins løg.
Hvíl í friði
við grønan svørð
á grønum bø
Grias vinarmaður.

Frits

Politisk viðmerking

Bert okkum sjálvum fyri at takka

Fyrsta frágreiðingin frá okkara nýggja búskaparráð er almannakunngjørd.

Skotsmálini, hon fær, eru sera vánalig.

Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður í fíggjarmálum, kallar frágreiðingina grunna og lítið sigandi. Jóannes Eidesgaard, fyrrverandi landsstýrismaður, somuleiðis í fíggjarmálum, hann át frágreiðingina ráa við villum og skrivar í Sosialinum, at her er okkurt spinnandi galið.

At hesin rýmdi landsstýrismaður loypur á bláman uttan at hugsa seg um, tað er onki nýtt. Heldur ikki standa búskaparfrøðiligu hugleiðingarnar hjá núverandi landsstýrismanni í fíggjarmálum í sjónvarpinum mát.

Onnur úttalilsi bera á sama borðið, umframt at feilir hava víst seg at vera í hagtølunum. Um skeiv hagtøl eru grundarlagið undir summum metingum, so eru tær metingarnar sjálvandi heldur ikki heilt eftirfarandi.

Undirritaði hevur verið talsmaður fyri, at vit hava okkara egna búskaparráð,og mælti til, at okkara búskaparráð og danska ráðgevandi nevndin samanbóru úrslitini hjá hvør øðrum, tá arbeiðið hjá báðum nevndum var úr hondum greitt. Ein samanbering hevði víst, hvat nevndirnar vóru samdar um, og hvat tær ikki vóru samdar um. Tað hevði verið sera áhugavert at fingið væl grundgivnar frágreiðingar um orsøkirnar til ósambæri teirra millum. Harumframt hevði ein samanbering sjálvandi víst og greitt óneyðugar villur í hagtølunum o.a.

Fakkunnleiki - eisini innan búskaparfrøði - gongur jú um landamark. Tað er júst styrkin í fakkunnleikanum, at hann eigur at tola samanberingar.

Í mínum svari til løgtingið í fyrispurningi nr. 100-13/96 frá 17. februar 1997 stendur:

"Tað kundi verið skilagott, at nevndirnar samanbóru niðurstøðurnar og gjørdu eina frágreiðing um, á hvørjum økjum og hví tær eru ósamdar. Tað kundi verið til stóra hjálp hjá politikarum, ið sum nú er fáa tvær frágreiðingar at halda seg til. Somuleiðis kundi tað verið ein faklig avbjóðing til tey, ið manna føroyska búskaparráðið og donsku ráðgevandi nevndina."

Sum tað sæst havi eg ongantíð verið talsmaður fyri, at búskaparráðið og ráðgevandi nevndin skuldu gera eina og somu frágreiðing. Ein samanbering av fortreytum og niðurstøðum hjá føroysku og donsku nevndini skuldi gerast eitt dygdargott og álítandi amboð hjá okkara politikarum, eisini sum stýringaramboð.

Aftaná fund í ríkisráðnum, har hesin møguleiki fyri eini konstruktivari samanbering varð nevndur, válkaði føroyska pressan sær í hesum. Føroyskir politikarar fylgdu eftir, og málið endaði soleiðis sum fyrispurningur í løgtinginum. Høvuðsgrundgevingin hjá tingmonnum var, at okkara menn vóru ikki førir fyri at standa seg mótvegis dønum. Teir somu, sum østu seg mest um hetta hugskot, eru teir somu, sum nú eru mest atfinningarsamir móti okkara egna búskaparráði.

Viðmerkjast kann, at Bjarni Olsen, formaður í búskaparráðnum, tók undir við hugskotinum um samanbering og samarbeiði.

Frágreiðingin frá búskaparráðnum er eitt sera hent amboð. Ivaleyst eru summar metingar ikki heilt rættar orsakað av tørvandi rættleika í føroysku hagtølunum. Men frágreiðingin hevur nógv skilagott, sum eigur at verða tikið til eftirtektar.

Men ístaðin fyri at viðgera teir týdningarmiklu boðskapirnar í frágreiðingini, so sum at fylgja boðskapinum frá ICES, og hvørjar avleiðingar tað fær, um vit ikki fylgja tilmælinum, so verður frágreiðingin rakkað niður í sand og ørsku av formonnunum fyri flokkarnar, sum hava og hava havt ábyrgdina av fíggjar- og búskaparmálum tey seinastu árini.

Fær almenningurin innanlands og uttanlands ta fatan, at ein frágreiðing um okkara búskaparviðurskifti frá føroyskum serfrøðingum er full av týdningarmiklum brekum, kann hetta minka uppaftur meira um okkara trúvirðið, serliga tá fleiri av okkara fremstu politikarum royna at blása brekini upp til meira, enn tey eru. Høvdu vit fingið samanberandi niðurstøður, høvdu vit ivaleyst sloppið undan meginpartinum av hesum trupulleikum.

At okkara trúvirðið aftur hevur verið fyri álvarsligum bakkasti, tað er eina ferð aftrat bert okkum sjálvum fyri at takka.

Edmund Joensen
løgmaður

HYGG HER!

KLAKSVÍKAR DAMPVASKARÍ
bjóðar tygum eina betri tænastu

Latið toyið inn hjá »Seytjan« í Havn, »Jungmann« í Runavík, »Josi« á Skála og »Rokoko« í Gøtu.

Vit átaka okkum at vaska alt vanligt toy.
Eisini gardinur. Dúkar verða vaskaðir/stívaðir.
Eisini **LEIGA** vit dúkar út til veitslur o.a.

Klaksvíkar Dampvaskarí
Box 119 · 700 Klaksvík · Tlf. 55160

SUMMARFRÍ

Stongt verður frá 28. juli til 18. august.

Matrikulstovan

Lesarabrøv

Lummafilosofisku lesarabrøvini á Lýðarsvegi

Hann heldur seg vera gravkúgvin í føroyska samfelagnum eftir rotinskapinum, óhumskuni, ørvitisskapinum, men hann er gorholið hjá tí niðurbarda, tí útihýsta, tí snýtta, tí minni menta .. ja, soleiðis kundi vit uttan himpr lýst Kleinsmiðin á Lýðarsvegi, ið man era einasti blaðstjóri/maður í heiminum sum hevur samrøður við seg sjálvan, enntá úr geglinum

Tað hevði verið áhugavert at spurt blaðstjórarnar á Dimmalætting og blaðstjóran á Sosialinum, um tey ikki kendu seg eitt sindur illa við, at blød teirra ikki eru slíkt málgagn hjá føroyinginum sum Oyggjatíðindi eru, sum er minsta "blað" í landinum.

Nú havi eg sjálvt starvast á Oyggjastíðindum nakrar mánaðar og eisini keypt "blaðið" nakrar ferðir í seinastuni, men so nógv lesarabrøv eru ikki í nøkrum øðrum føroyskum blaði sum í Oyggjatíðindum.

Og so kundu vit eisini spurt somu blaðstjórar, hví teir ikki loyva dulnevndum lesarabrøvum at nevna nøvn sum Oyggjatíðindi gera.

Og so kundu vit eisini spurt, hví hesir blaðstjórar ikki hava samrøður við seg sjálvar sum blaðstjórin á Oyggjatíðindum hevur.

Og vit kundu tikið blaðstjóran á Lýðarsvegi við í hesa rundu av spurningum til blaðstjórar og spurt hann, hvussu tað ber til, at lesarabrøvini ongantíð fáa nakað svar. Eg havi so ongantíð sað nakað.

Og hví tey altíð eru líka nógv, antin 10 ella 12.

Og hvussu tað ber til, at tey fylla altíð 2-teigin upp á orðið, og dulnevnini eru altíð tey somu, "Kánus", "Pegasus", "Lesinestur", "Fólkafloksmaður", "Sambandsmaður" o.s.fr., o.s.fr.

Ja, tað kundu verið settir eitt ótal av spurningum og við hesum spurningum kundu vit so leysliga fingið settan ein mun á teim seriøsu bløðunum í landinum og so egotrippinum hjá Klein-smiðinum á Lýðarsvegi.

Og eg vóni at blaðstjórarnir svara hesum sera umráðandi spurningum!

Hvør er øvundsjúkur

Í einum at vísa seg aftursvari til viðmerking eg hevði herfyri í Dimmalætting og Sosialinum, tosar Klein-smiðurin um øvundsjúku, men *hvønn* eru "summir" og "onkur" øvundsjúk inn á, kundu vit spurt.

Og hvat eru "summir" og "onkur" øvundsjúkur inn á?

Og at enda, *hvørji* eru hesi "summi" og "onkur"?

Hví kemur Klein-smiðurin ikki fram við nøvnum?

Er hann vorðið smæðin og varin?

Ólavur í Beiti
17.07.1997